## Oddagrein

**Eyðun Klakstein**
*eydun@sosialurin.fo*



# TAÐ ER TURBOLENSUR Í LUFTINI

Samstundis sum løgmaður í Ólvsøkurøðuni heitti á samgonguna um at standa saman í royndini at loysa stóru búskaparligu avbjóðingarnar, so skerst tað ikki burtur, at hann hesa ferð spældi meiri við flokspolitisku formansvøddunum, enn hann áður hevur gjørt.

Tað gjørdi hann, tá ið hann klikti inn á Fólkaflokkin fyri at hava verið við til at minka um blokstuðulin, og tá ið hann klikti inn á fyrru ABC samgonguna, tá ið hann vaskaði skattalættarnar yvir tey, sum sótu við róðrið, tá ið hann sjálvur hevði minni leiklut, enn hann nú hevur tað.

Spurningurin er, hvat skal leggjast í hetta. Tað hevur leingi ljóðað, at Javnaðarflokkurin ikki er so heilhugaður samgongufelagi. Hans Pauli Strøm var stutt undan Ólavsøku ikki blíður við Rósu Samuelsen, og hóast formaður Javnaðarfloksins tá sá út til at slætta sjógvin, so hevur eisini hann signalerað lítlan samgonguhug.

Á Ólavsøku luttók formaður Javnaðarfloksins ikki. Tað gjørdi hann heldur ikki í fjør, og tað er sjálvsagt eyðsýnt og signal, sum neyvan boðar frá góðum samgongustevi og politiskari virðing, at formaðurin í einum av samgonguflokkunum leggur so lítið fyri, tá ið hann skal ganga aftanfyri samgonguleiðaran.

Løgmaður var eisini meiri floksformaður enn samgonguleiðari, tá ið hann viðgjørdi uppskotið um stjórnarskipan. Arbeiðið átti at verið íligið, eftir at allir flokkar hava arbeitt við tí ítólv ár. Løgmaður staðfesti, at uppskotið er burturdottið á Ólavsøku, og tá ið hann segði, at tað fer at koma fram aftur, var tað merkisvert, at hann snaraði boðskapinum soleiðis, sum tann vongurin av Sambandsflokkinum, ið seinastu tíðina ikki hevur verið serliga hugaður fyri uppskotinum, vil hava tað, heldur enn sum samgongufelagarnir og serliga Fólkaflokkurin og ikki minst Poul Michelsen sum formaður í nevndini, ið hevur arbeitt við uppskotinum, aftur og aftur hava sagt seg vilja.



Tað var snilt av løgmanni at styrkja um sína støðu innanfloks.

Retorikkurin smakkar neyvan Fólkaflokkinum væl, og tá ið Javnaðarflokkurin neyvan er serliga eldhugaður, so kann tað vera, at talan var um fyrsta leik í valstríðnum, sum nærkast.

Løgmansrøðan verður umrødd týsdagin, og tá fæst at síggja, hvat samgongufelagarnir halda um boðskapin, og hvussu hann var innpakkaður. Møguliga er skipanin øll sum hon er eyðkend av líkasælu, men tað ber væl til at siga, at røðan legði upp til politiskan turbolens.

### » Løgmaður spældi meira við flokspolitisku vøddunum



# Tveir landsstýrismenn mangladu

Í gjár var farið undir nýggja tingsetu, og sum siður er, varð skrúðgonga við leiðandi politikarum, embætisfólki og prestum.

Í fínum ólavsøkuveðri fór skrúðgongan úr Dómkirkjuni og niðan á Tinghúsvøllin, har Ólavur Hátún stjórnaði kórsanginum. Tá ið tingið varð sett, heitti løgmaður á samgonguna og andstøðuna um at samstarva fyri at røkka neyðugum málum.

Bert ein av trimum landsstýrismonnunum hjá Javnaðarflokkinum luttóku í morgun. Helena Dam á Neystabø gekk aftaná Kaj Leo Holm Johannesen og Jørgeni Niclasen í skrúðgonguni. Hinir báðir landsstýrismenninir vóru ikki við, og undir tingfundinum vóru stólarnir hjá Jóannesi Eidesgaard, landsstýrismanni í fíggjarmálum, og hjá Akseli Johannesen, landsstýrismanni í heilsumálum, tómir.

Aksel Johannesen hevði givið avboð, tí hann var sjúkur.

Jóannes Eidesgaard var ikki við í skrúðgonguni fyri einum ári síðani, og tá ið tingið varð sett ólavsøkudag í fjør. Fíggjarmálaráðið hevur boðað frá, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er í summarfrí henda mánaðin.

Tveir tingmenn høvdu í skrivi til tingformannin biðið um, at næsti maður á listanum møtti fyri teir. Fyri Bill Justinussen møtti Vinjard Johansen. Tordur J. Niclasen, sum er fyrsti varamaður hjá Miðflokkinum, hevði boðað frá, at tað ikki bar honum til at møta.

Jaspur Vang úr Sambandsflokkinum bað um, at næsti maður á listanum møtti fyri hann. Tað var Edva Jacobsen, og eisini hon var við í skrúðgonguni og á tingfundinum.



### » Ikki tikin upp á ráð

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 12



### » Hví smílist løgmaður?

KÁRI P. HØJGAARD
KJAK Á SÍÐU 12

# The Sun í holt við grindadrápið

Stóra enska tabloid-blaðið The Sun hevur í morgun grein um grindadrápið í Klaksvík í farnu viku. Blaðið brúkar stór lýsingarorð um drápið undir yvirskriftini »Brutalt slakt av grindahvalum«.

Blaðið skrivar, at slaktaðu grindahvalirnir liggja á bryggjuni bert 230 míl frá Bretlandi, og at familjur við børnum ganga og mæla millum hvalirnar.

Sambært The Sun vóru hvalirnir hakkaðir til deyðis við knívum og krókum, og stór fjøld av fólki var komin at hyggja at drápinum.

The Sun hevur tosað við Peter Hammarstedt, sum umboðar Sea Shepherd felagsskapin, og sum skrivaði frágreiðingina til heimasíðuna hjá felagsskapinum. Hann greiðir The Sun frá, at onkir av hvalinum skuldu hava seks sløg í »høvdið«, áðrenn teir doyðu.




**Sosialurin**

Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*